

# Nikolaj L. Kaas og seinasti danski filmurin - Reconstruction

**Evnaríki danski sjónleikarin Nikolaj Lie Kaas er í hesum døgum aktuellur í virðislønta filminum Reconstruction, ið nú herfyri hevði frumsýning í biografum runt í Evropa. Det Danske Filminstitut hevur útvalt hendan filmin sum danska boðið uppá ein Oskar-kanditat innanfyri bólkin Best Foreign Language Film.**

Nikolaj Lie Kaas er eisini aktuellur á Canal+ við filminum Et rigtigt menneske, har hann er í høvuðsleiklutinum sum "P".

Hesin filmurin snýr seg um ósjónliga vinin hjá tí sjey ára gomlu Lisu, "P", sum fær møguleikan at gerast eitt veruligt menniskja. Hann skal læra seg at verða djarvur, erligur og samvitskufullur. At byrja við er hann ein hugspunnin figurur hjá Lisu, ið býr aftanfyri tapetið í hennara kamari, men so fer P frá Lisu og hennara hugheimi. Hann endar á eini asylmiðstøð, Sandholmlejren, har hann lærir tað danska málið og har hann lærir at integrera seg í samfelagið. Eftir hetta fær hann eina íbúð og arbeiði í einum skógvahandli. Hann kemur út í ein heim, ið tekur ímóti honum við illgruna og hatri, men eisini undran og kærleika.

Hesin filmurin fekk góð ummælir, tá hann kom út í 2001, t.d. fekk hann tríggjar "hattar" av fimm frá filmsummælaranum á DR, Bogart. Nikolaj bleiv serliga nógv róstur fyri sítt avrik, ið hevur nógv at siga fyri hendan filmin, sum svenskarin Åke Sandgren hevur leikstjórnað.

Sum 17 ára gamal var hann fyri fyrstu ferð við í filmi. Hetta var filmurin hjá Søren Kragh-Jacobsen, frá 1991, "Dreingirnir frá Sankt Petri". Fyri hendan leiklutin fekk hann eina Robert og eina Bodil-virðisløn. Í 1994 slapp hann inn á Teaterskolen í Keypmannahavn og eftir lokna útbúgving starvaðist hann á Det Kongelige Teater, her leikti hann m.a. í Ibsens Per Gynt. Í 1998 var hann við í tí nógv umtalaða dogmufilminum hjá Lars Von Trier "Idioterne", har hann somuleiðis fekk ein Bodil.

**Reconstruction**
Filmurin hevur longu móttikið eina Cannes-virðisløn og seinast FIPRESCI-virðislønina, fyri besta nýggja leikstjóra, á viðurkenda spanska San Sebastian film festivalinum.

Hetta er ein sera sjálvsamur og rættiliga einastandandi filmur. Filmurin snýr seg um danska myndamannin Alex og ta svensku Aimee, ið forelska seg, í Keypmannahavn. Her er Aimee komin at vitja við sínum manni, ið er høvundur og heldur fyrilestrar. Men kanska er tað í veruleikanum hesin høvundurin, ið skrivar søguna um Alex og Aimee. Tað er her at filmurin fer ein annan veg enn flestu aðrir filmar, og tað er eisini her at filmsheitið ger seg galdandi. Søgan í filminum fer fram á tveimum støðum, endurtekur seg og yvirlappar. Filmurin gongur fyri seg í Keypmannahavn á fleiri kendum støðum.

Christoffer Boe hevur leikstjórnað filmin. Av sponsku filmskritikarunum úr filmfestivalinum í San Sebastian meta teir hann vera tann mest lovandi filmspersónin í Norðurlondum síðan Lars Von Trier.

Filmurin er innstillaður til at blíva útvaldur millum tey fimm valevnini fyri besta útlendska filmin á næstu Oskar-handanina, sum verður 27. februar. Tann 27. januar verður tað avgjørt um Reconstruction sleppur at verða millum tey fimm valevnini í bólkinum "Best Foreign Language Film".

Christoffer Boe og hansara filmslið, sum hann hevur hildið saman við líka síðan frá filmsskúladøgunum, eru longu til reiðar við næsta filminum - "Prediction", ein road-movie, ið verður frumsýndur í nærmastu framtíð.







Úr filminum »Gamle mænd i nye biler« frá 2002

Úr filminum »De grønne slagtere« frá 2003



**Filmir, Nikolaj Lie Kaas hevur leikt við í:**

- Drengene fra Sankt Petri(1991)
- Min fynske barndom
- Idioterne
- Besat
- I Kina Spiser de hunde
- Blinkende lygter
- Max
- Et rigtigt menneske
- Jolly Roger
- Elsker dig for evigt(2002)
- Gamle mænd i nye biler(2002)
- De grønne slagtere(2003)
- Reconstruction(2003)

**Á Canal + fríggjadagin 3. oktober í »Et rigtigt menneske«**



Úr filminum »Reconstruction« frá 2003